# Handil, samkomuhús og kirkja í Hoyvík

**Við løgmannbreyt verður nú gjørt klárt at byggja ein handil og ein samkomubygning. Ætlanir eru eisini um kirkju og samkomuhús hjá Brøðrasamkomuni**

ÚTSTYKKING
*Eirikur Lindenskov*



*Niðast við Løgmannabreyt í Hoyvík verður nú stykkjað út til matvøruhandil og samkomuhús. Hinumegin vegin verða íbúðir bygdar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Í løtuni eru teir í ferð við at stykkja út niðast við Løgmannabreyt í Hoyvík. Í hesum umfarinum verður stykkjað út til ein handilsbygning hjá Erling Bech, sum eigur og rekur Ternubúðina á Ternuryggi og ein samkomubygning til Meinigheitina í Hoyvík. Hinu megin vegin verður stykkja út til randarhús.

Sjúrður Olsen, sum er formaður í teknisku nevnd hjá Tórshavnar býráð sigur, at stórar ætlanir eru í Hoyvíkshaganum.

– Umframt hesa útstykkinginia, so eru ætlanir um fleiri aðrar samkomubygningar. Hinu megin løgmannabreyt hevur Brøðrasamkoman keypt øki, sum skal nýtast til samkomubygning, og oman fyri barnagarðin og skúlan verður krikja bygd, sigur hann.

Vegurin, ið nú verður gjørdur, skal ganga víðari niðan til kirkjuna. Nær kirja verður bygd, veit Sjúrður Olsen ikki at siga, men Kirkjumálaráðið keypt økið til kirkjuna, og varð tann handlin avgreiddur í heyst.

Longri upp við Løgmannabreyt, áleið har sum nýggi barnagarðurin er bygdur, er eisini ætlan um at gera ein handilsdepil og íbúðarblokkar.









# Landsstýrislønir aftur á breddanum



**Í eini roynd at forða fyri báli og brandi, hvørja ferð lønirnar hjá landsstýrismonnum skulu takast upp, skal ein nevnd við serkønum setast at viðgera lønarviðurskiftini hjá løgmanni og landsstýri. Nevndin skal dagføra lønirnar eina ferð hvørt valskeið**

LØNARNEVND
*Ingi Rasmussen*

Nú ger løgmaður aftur eina roynd at fáa loyst eldfima málið um løn og eftirløn hjá landsstýrismonnum.

Hann hevur lagt eitt uppskot fyri løgtingið, sum hevur til endamáls »at tryggja løgmanni eitt dygt og væl grundað tilmæli um samsýningar og eftirløn landsstýrismanna«. Løgmaður vil hava heimild at seta eina nevnd við trimum fólkum, sum ikki eru løgtingsmenn, landsstýrismenn ella fólk, sum eru í starvi í fyrisitingini. Nevndin skal geva løgmanni eitt tilmæli um løn og eftirløn, ið tekur støði í tignini og ábyrgdini, sum liggur í størvunum.

## Ringar royndir

Løgmaður er helst vorðin klókur av skaða, tí hann hevur ringar royndir av at finglast við lønarspurningin hjá sær sjálvum og sínum landsstýrismonnum.

Í mars 2001 legði hann eitt uppskot fyri løgtingið um broyting í lønarviðurskiftunum hjá landsstýrismonnum, sum hevði til endamáls at javnseta eftirlønina við hana hjá løgtinginum. Men millum aðru og triðju viðgerð kom eitt broytingaruppskot, sum gjørdi uppskotið afturvirkandi heilt aftur til 1951.

Hetta elvdi til mikla øsing og umtalu millum fólk, og undirskriftir vóru innsavnaðar, sum mótmæltu, at tingmenn góvu sær sjálvum eftirløn við afturvirkandi megi. Ført varð fram, at tingmenn lóggóvu í egnan lumma.

Málið var tikið aftur, og løgmaður vendi aftur til upprunaliga uppskotið, sum ásetti, at lógin bert fekk gildi fyri løgmann sjálvan og landsstýrismenn, sum tóku sæti eftir valið í 1998.

## Forðar endurtøku

Nú vil løgmaður sleppa undan, at sama søgan endurtekur seg, og tí vil hann hava eina nevnd, sum javnan tekur lønarviðurskiftini upp til dagføringar.

– Nýskipanin við hesum uppskoti er, at løgmaður frameftir eina ferð í hvørjum valskeiði fær eitt væl grundað tilmæli, sum ikki er heft at áhugamálum í politisku skipanini, at nýta sum grundarlag fyri støðutakan um, hvørt lógaruppskot um broytingar í samsýningum og eftirløn landsstýrismanna skal setast fram, sigur Anfinn Kallsberg løgmaður í viðmerking til uppskotið.

Við uppskotinum biður løgmaður um pengar til hesa serligu nevndina, og roknað verður við, at hon fer at kosta umleið 100.000 krónur tað árið, tilmælið verður latið.



